# Tað er aftur vorðið gerandisdagur á Skála

**Fyri fyrstu ferð í ár noyddust skálamenn fara av heimavøllinum uttan at hava vunnið, og nú hava teir tapt tvær ferðir í tríggjar dagar**

SKÁLA-EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Skálamenn eru síðstu lítlu vikuna orduliga komnir niður aftur á jørðina. Mikukvøldið taptu teir 2-0 í Runavík. Tað var kanska at liva við. Meinari rakti tað, at teir leygardagin fyri fyrstu ferð í ár noyddust av heimavøllinum við ongum. EB/Streymur vitjaði, og teir struku norður aftur á Mølina við fullari úrtøku.

Skála legði bragdligari fyri. Teir høvdu fríska lotið inn á stýriborðsloringina, og teir vóru ofta í brotsteiginum hjá mótstøðumonnunum. Men tað eydnaðist teimum ikki at spæla seg til heilt upplagdar møguleikar. Næst við vóru teir, tá ið miðvallarin í høgru, Hanus Thorleifsson, sendi í tvørtræið aftanfyri Gunnar á Steig.

Gestirnir vóru væl skipaðir í verjupartinum, har Gert Hansen og Fróði Clementsen í miðverjuni megnaðu at halda Jónhardi Frederiksberg og Boga Gregersen frá fatinum. Tá ið eitt stórt korter var farið, fekk EB/Streymur málið, sum hevði við sær, at tað vóru teir, sum avgjørdu, hvørjum fyritreytum tað skuldi spælast eftir. Eftir uppspæl í vinstru lá flata innleggið hjá Hans Paula Samuelsen akkurát har tað skuldi - millum verjuna og málverjan. Sorin Anghel var akkurát ov seinur fram, men við handara stólpan var Hallur Jacobsen leysur og stýrdi bóltinum í kassan.

Heimaliðið helt á at trýsta, men søgan var tann sama. Teir megnaðu ikki at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Onkra ferðina fingu teir horna, uttan at nakað spurdist burturúr. Fimm minuttir undan hvíldini fingu teir mál eftir deyðbólt. Úr 20 metra fjarstøðu smekkaði miðverjin Arnhold Berg úr eitt sindur til vinstru og upp um manngarðin og inn við nærra stólpanum.

Málið tóktist bera við sær, at Skála eftir steðgin skuldi leggja trýst á. Teir vóru grammir, og teir vóru onkra ferðina framvið. Men tá ið eitt korter var farið, koppaði tað aftur til fyrimunar fyri EB/Streym. Eftir langa framlegging gjørdist Sorin Anghel púra leysur innanfyri frammarlaga staddu verjuna. Hann bíðaði meðan bólturin stiklaði eina ferð. Júst tá ið hann skuldi miðja móti málinum, fór hann um koll. Dómarin bríksláði fyri brotssparki. Tað vóru skálamenn ikki væl nøgdir við. Teir hildu, at tað var bólturin, sum varð spældur, og at álopsmaðurin síðani datt um beinini. Tað metti dómarin ikki, men hann vísti kortini ikki reyða kortið fyri neyðbremsu.



*Bárður Olsen og EB/Streymur vunnu ein heldur óvæntaðan sigur inni á Skála leygardagin, tá ið teir vóru á vitjan hjá oddaliðnum í 1. deild.*

Sonni L. Petersen var tryggur úr ellivu metrum, og fimm minuttir seinni var hann meistari fyri triðja málinum. Skála hevði hornaspark. Bólturin varð sendur út í vinstru til Hans Paula Samuelsen, sum spældi diagonalt til Bárð Olsen, ið beinanvegin eftir steðgin var komin á vøllin fyri skadda Hall Jacobsen. Bárður fór við tann spentar ál frameftir, spældi síðani mitt fyri til Sonna L. Petersen, sum við ferð var runnin frá verjuni. Heini Kristiansen kendi seg noyddan at leypa út, men Sonni sendi framvið honum og í kassan.

## Umskipaðu og satsaðu

At EB/Streymur eftir fimm minuttum hevði skorað tvey mál tók luftina úr heimaliðnum. Fyri at bøta um saknin av Paula G. Hansen á miðvøllinum høvdu teir umskipað soleiðis at Iulian Florescu var sentralur miðvallari, meðan Rúni Rasmussen var í høgru, og Bárður Danielsen í vinstru.

Skála fekk ikki fatur á miðvøllinum, soleiðis sum teir hava havt fyrr í ár. Teir fingu ikki samanspælið at hanga saman, og talan var ikki um longu og neyvu diagonalu skiftini, sum fyrr í ár hava lirkað mótstøðuverjurnar upp.

Síðstu løtuna royndu teir at spenna álopsbogan. Teir høvdu bara tríggjar í verjuni og tríggjar heilt frammi. Eugen Stanciu ella Pujo, sum teir kalla hann, varð settur inn í álopið, og tað eydnaðist honum at minka um munin, tá ið hann eftir langa framlegging eftir miðásinum setti framvið málverjanum, sum hevði kent seg noyddan at leypa út.

Tá restaðu tað seks minuttir, stutt eftir var Pujo aftur nær við, men heimaliðið kom ikki nærri einum stigi. EB/Streymur var væl skipað. Tað hevur stóran týdning, at Marni Djurhuus aftur er førur fyri at spæla alla tíðina, og Sorin Anghel og Sonni L. Petersen eru so skjótir og fullir í sjálvsáliti, at teir eru førir fyri at seta øllum verjunum grá hár í høvdið. Serliga tá ið tað er neyðugt hjá mótstøðuliðnum at leypa á. Tað var tað mest sum alla tíðina hjá skálamonnum, og tað sektaði EB/Streymur teir fyri.

**Skála-EB/Streymur 2-3 (1-1)**
0-1: Hallur Jacobsen 17.
1-1: Arnhold Berg 40.
1-2: Sonni L. Petersen br 60.
1-3: Sonni L. Peterseen 65.
2-3: Eugen Stanciu 75.)
**Dómari:** Odmar Andreasen
**Skála:** Heini Kristiansen - Rúni Rasmussen, Arnhold Berg, Dusan Jaic, Bárður Danielsen (Ronni Hansen, 80.) - Hanus Thorleifsson (Eugen Stanciu, 75.), Nenad Stankovic, Iulian Florescu, Alexandur Johansen - Bogi Gregersen, Jónhard Frederiksberg
**Gult kort:** Nenad Stankovic, Iulian Florescu, Eugen Stanciu
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig - Carl H. Høgnesen, Gert Hansen, Fróði Clementsen, Jóhann á Stongum - Hallur Jacobsen (Bárður Olsen, 46.), Jákup Martin Joensen (Knút Vesturrún, 88.), Marni Djurhuus, Hans Pauli Samuelsen (Esmar Eiðisgarð, 86.) - Sonni L. Petersen, Sorin Anghel
**Gult kort:** eingin

# Argjamenn í hølunum á TB

**Eftir ein uppibornan sigur á FS Vágum á Argjum leygardagin, halda argjamenn summarfrí á næstfremsta plássinum beint í hølunum á oddaliðnum TB**

2. DEILD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

AB tykist at verða væl fyri. Blandingin av eldri spælarum við royndum úr 1. deild og so ungum leikarum, ið hava evnini til at spæla í bestu deildini, vísir seg at verða góð. Leygardagin høvdu argjamenn vitjan av vágamonnum, og 3-1 sigurin til AB var fult uppiborin.

## Tvey brotsspørk

Dysturin var ikki meiri enn fýra minuttir gamal, tá ið AB fekk ein gyltan møguleika at leggja seg á odda. Brotsspark var dømt til heimaliðið, men Bjarni Jørgensen misnýtti frá blettinum. Dysturin var rættuliga javnur næstu løtuna, men tá ið ein lítil hálvur tími var leiktur, var aftur bríkslað fyri brotssparki til heimaliðið. Hesaferð var Rani Christiansen settur at skjóta, og hann setti bóltin í netið til 1-0 til AB.

Tað gekk bert ein minuttur afturat, so var 2-0, tá ið sterki miðvallarin hjá AB, Pætur Dam Jacobsen, sendi eitt langskot í netið. FS Vágar gav tó ikki skarvin yvir, og stutt fyri hálvleik eydnaðist tað vágamonnum at minka um munin til 1-2 við einum máli, sum Per Joensen skeyt.

Í seinna hálvleiki var tað AB, ið var við yvirlutan og hevði teir flestu møguleikarnar. Tað eydnaðist teimum at fáa eitt mál afturat, tá ið 20 minuttir vóru eftir at leika. Málið skeyt Símun Hansen, og harvið vunnu argjamenn 3-1 á einum av hinum liðunum, ið kunnu metast at gera seg galdandi í stríðnum um uppflyting.

**AB-FS Vágar 3-1(2-1)**
1-0 Rani Christiansen brtsp.
2-0 Pætur Dam Jacobsen
2-1 Per Joensen
3-1 Símun Hansen



**Stór frásøgn frá spennandi kapproðrinum á Jóansøku verður í blaðnum í morgin**



# HM í Libya

**FIDE-heimsmeistaraskapurin verður í hesum døgum leiktur í Libya. Flestu favorittar hava telvað seg fram til fjórðingafinalurnar í Knock-Out kappingini, men eitt nú mátti bretin Nigel Short (2712) longu í 2. umfari boyggja seg**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Tað tóktist heldur undrunarvert, tá FIDE fyri umleið hálvum ári síðani avgjørdi at lata Libya - við einaráðisharranum seinastu 34 árini og fyrrverandi stórfíggindi Vesturheimsins Moammar Gadhafi við stýrisvølin - skipa fyri kappingini. Hin mangan órokniliga FIDE-forsetin, Kirsan Ilumzhynov, helt, at Libya nú reformativt hevði opnað seg upp. Helst hugsaði hann um almennu vitjanina hjá bretska forsetisráðharranum Tony Blair í Libya fyri nøkrum mánaðum síðani, og vinarliga tónan Gadhafi hevur havt mótvegis Vesturheimin seinasta árið.

Fleiri stórmeistarar hava tó klaga av um avgerðina hjá FIDE at hava kappingina í Libya. Ísraelar sleppa eitt nú ikki inn í landið, og hevur tað elvt øði í menn.

## Manningin

Teir heilt sterkastu í heiminum taka ikki lut. Kappingin er nevnliga ein liður í at finna ein felagsheimsmeistara, har vinnarin í Libya sleppur at møta Kasparov. Vinnarin av hesum dysti, sum helst verður leiktur tíðliga komandi ár, skal síðani hitta vinnaran av Kramnik - Leko dystinum, sum verður í septembur/oktobur. Hervið fáa vit vónandi einaferð í 2005/-2006 ein sannan heimsmeistara aftur.

Hægstrataði Veselin Topalov (2737) úr Bulgaria hevur higartil havt eina framúrskarandi kapping. Hann hevur vunnið sínir dystir (tvey talv) leikandi lætt. Í 1/8-deilsfinaluni vann bulgarin 2-0 móti tí annars vælleikandi Zdenko Kozul (2627). Topalov tykist tungur at syfta, nú farið verður undir at telva fjórðingfinalur.

Russin Alexander Grischuk (2719) og bretin Michael Adams (2731) eru somuleiðis millum luttakararnir sum enn berjast um HM-tittulin. Meira um endabrestin í næstu viku.
Danin Peter Heine Nielsen (2638) tapti í 2. umfari móti Teimour Radjabov (2670), men tað varð fyrst eftir snartalvsumdyst. 13 ára gamli Magnus Carlsen (2552) úr Norra, tapti eftir umdyst móti hægri rataðum telvara í 1. umfari.

## Olaf maksimum

Olaf Berg (2242) og Ólavur Simonsen (2241) vóru undan kappingarbyrjan stórfavorittar at vinna HT open, sum seinastu tvey vikuskiftini hevur verið telvað í hølum Havnar Telvingarfelags. Kappingin varð lýst í góðari tíð, og virðislønirnar vóru sera góðar, men tíverri luttóku flestir av okkara sterkastu telvarum í Føroyum ikki. Nærum 300 ratingstig skiltu Olaf og Ólavur frá triðhægstrataða telvara í kappingini, Herluf Hansen (1956).

Fyrra helvt av kappingini varð leikt seinasta vikuskiftið, og støðan varð tá tann, at Olaf hevði fýra stig og fult stigatal, meðan Ólavur og Herluf høvdu hálvtfjórða stig. Ólavur og Herluf leiktu javnt í 3. umfari. Olaf helt fram við tryggu telvingini hetta seinna vikuskiftið, meðan alt hinvegin rapladi saman hjá Ólavi. Teir hittust leygardagin í 5. umfari, har Olaf við svarta fólkinum tíðliga fekk útjavnað støðuna. Og tá Ólavur ikki fann røttu planina og fekk kroysta støðu, var Olaf skjótur og tók alt stigið eftir einans 24 leikum. Talvið avgjørdi kappingina. Olaf vann síðani á m.a. Herluf og vann uppiborið HT-open við maksimum skoru, 8 av 8! Havnarmaðurin vinnur sær umleið 15 ratingstig fyri ómakin. Tað má kennast undarligt at einans vinna sær 15 ratingstig við maksimum skoru. Ratingveika manningin hevði hesum viðvíkjandi høvuðsleiklutin.

Herluf endaði á 2. plássi við 6,5 stigum og Rani Baldursson úr KTF varð triðfremstur í røðini við 6 stigum. Eitt sera gott úrslit hjá unglingaføroyameistaranum í 2003, sum eitt nú vann eitt gott talv við svarta fólkinum móti Ólavi. Ólavur sjálvur bleiv nr. 4 við 5,5 stigum, og missur fitt av rating.

## Talvið hesa vikuna

GM Topalov, V (2737) - GM Movsesian, S (2647)
WCC 2004 (3. umfar), 23.06.2004

1.e4 c5 2.Rif3 Ric6 3.d4 cxd4 4.Rixd4 Fc7 5.Ric3 e6 6.Be3 a6 7.Fd2 Rif6 8.0-0-0 (Topalov velur sum vant tann kompromileysa stílin) 8...Bb4 9.f3 Rie5 10.Rib3 b5 11.Kb1 Be7 (Avbýtið á c3 gevur nøkunlunda javnt spæl) 12.Ff2! d6 13.Bb6 Fb8 14.Bd4 Ric6 15.Be3 Rid7 16.g4 0-0 17.g5 b4 (Í slíkum støðutýpum í sisilionsku byrjanini er kapprenning móti konginum í hvør sínum borði tiltikið) 18.Ria4 Rice5 19.Rg1 Bb7 (Svartur hevur leikt byrjanina væl, men Topalov er meistari fyri at opna slíkar støður upp) 20.Ria5 Rc8 21.b3 Bc6 22.Rixc6 Rixc6 23.f4 Ric5? (Gevur hvítum léttari spæl móti konginum, samstundis sum svarta c-finnan stendur í vegin fyri rókinum ) 24.Rixc5 dxc5 25.f5 Rie5 26.Bh3 exf5 27.exf5 Re8 28.Bf4 (Bert spurningur um tíð nær Topalov brýtur ígjøgnum) 28...Bd6 29.g6! hxg6 30.fxg6 Ra7 31.Fg2 Ric4 32.Rxd6! Rixd6 33.Fd5 Rd8 34.gxf7+ Rxf7 35.Be6 Fb7 36.Fg5! Hóttur Fxg7 mát og Fxd8 og svartur gavst tí 1-0

## Støðan, 1. deild menn

| | | vunnin | | tapt | | | mál- | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | dystir | v | - | j |
| - | t | málmálmunurstig | | | | | | | | |
| 1 HB | 8 | 5 | - | 2 | - | 1 | 21 | 9 | 12 | 17 |
| 2 Skála | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 20 | 10 | 10 | 17 |
| 3 NSÍ | 8 | 4 | - | 3 | - | 1 | 14 | 10 | 4 | 15 |
| 4 EB/Streymur | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 17 | 13 | 4 | 14 |
| 5 VB | 9 | 3 | - | 4 | - | 2 | 13 | 10 | 3 | 13 |
| 6 B36 | 8 | 3 | - | 3 | - | 2 | 17 | 12 | 5 | 12 |
| 7 KÍ | 9 | 2 | - | 6 | - | 1 | 15 | 11 | 4 | 12 |
| 8 GÍ | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 13 | 19 | -6 | 11 |
| 9 ÍF | 9 | 1 | - | 1 | - | 7 | 13 | 32 | -19 | 4 |
| 10 B68 | 8 | 0 | - | 1 | - | 7 | 6 | 23 | -17 | 1 |

## Støðan, 2. deild menn

| | | | | vunnin | | tapt | mál- | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | - | j | - | t | mál | mál | munur | stig |
| 1 TB | 9 | 7 | - | 0 | - | 2 | 26 | 11 | 15 | 21 |
| 2 AB | 9 | 6 | - | 2 | - | 1 | 18 | 10 | 8 | 20 |
| 3 B71 | 9 | 5 | - | 1 | - | 3 | 26 | 22 | 4 | 16 |
| 4 Royn | 9 | 5 | - | 0 | - | 4 | 23 | 20 | 3 | 15 |
| 5 FSV | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 31 | 19 | 12 | 14 |
| 6 Sumba | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 14 | 14 | 0 | 14 |
| 7 KÍ | 9 | 2 | - | 3 | - | 4 | 18 | 22 | -4 | 9 |
| 8 B36 | 9 | 2 | - | 2 | - | 5 | 10 | 23 | -13 | 8 |
| 9 LÍF | 9 | 1 | - | 3 | - | 5 | 11 | 24 | -13 | 6 |
| 10 VB | 9 | 0 | - | 3 | - | 6 | 7 | 19 | -12 | 3 |